UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Tíma ikki av landinum at arbeiða

Tey, sum arbeiða hjá teimum stóru norsku oljufeløgunum, hava lítlan hug at taka av, tá feløgini bjóða teimum arbeiði á deildunum, sum feløgini hava uttan fyri Noreg.

Sambært blaðnum Aftenposten aftra fleiri seg við at taka av tilboðnum, tí tað er ikki altíð vist, at tey fáa arbeiði aftur, tá tey koma heimaftur. Harafturat ber skiftið vanliga í sær, at annað av hjúnunum noyðist at siga arbeiði í Noregi frá sær. Ein annar vansi er, at fólk missa ein part av rættindunum til pensjón í Noregi, eru tey ov leingi uttanlands.

Rasmus Sunde, stjóri í stórfyritøkuni ABB, sigur, at skulu oljufeløgini gera sær vónir um at fáa sínar norsku medarbeiðarar at fara av landinum at arbeiða eitt tíðarskeið, noyðast feløgini at tryggja fólki, at tey fáa arbeiði, tá tey koma heimaftur. Helst skulu fólk eisini fáa lyfti um eitt minst líka væl lønt arbeiði sum tað, tey fara úr, sigur Rasmus Sunde.

Umleið 300 norðmenn arbeiða í løtuni á teimum 25 deildunum, sum Statoil og Hydro hava kring heimin. Bæði feløgini hava gjørt av at økja virksemið uttanlands, og tað fer at bera í sær, at talið á norðmonnum, sum skulu uttanlands at arbeiða í norsku oljuvinnuni, skal fleirfaldast. Men tað fer samstundis at krevja, at feløgini geva sínum medarbeiðarum í útlandinum betri sømdir.

## Lindø illa fyri

Lindø skipasmiðjan, sum er tann størsta í Danmark, er illa fyri. Skipasmiðjan hevur alt ov fáar fyrispurningar um nýbygging, og tí gjørdi leiðslan í síðstu viku av at siga 200 fólk úr starvi. Sum er hevur skipasmiðjan bíleggingar um fýra bingjuskip og tvey skip til donsku verjuna.

2800 fólk arbeiða í løtuni á Lindø skipasmiðjuni, sum A. P. Møller eigur.

# Nýggi forsetin í Kolombia lovar fólkinum frið

**Høgrapolitikarin Alvaro Uribe er valdur til nýggjan forseta í tí borgarakrígsherjaða Kolombia**

KOLOMBIA
*Árni Joensen*



*Nýggi forsetin í Kolombia, Alvaro Uribe, hevur lovað fólkinum frið*

*Mynd: Reuters*

Høgrapolitikarin Alvaro Uribe fekk 53 prosent av atkvøðunum á fyrra umfari av tjóðartingsvalinum í Kolombia sunnudagin. Úrslitið ber í sær, at tað verður einki seinna umfar, og tað er fyrstu ferð í kolombisku søguni, at tað er hent.

Fremsta mótvalevni hansara, Horacio Serpa úr liberala flokkinum, fekk 32 prosent av atkvøðunum, meðan tað triðja valevnið, fakfelagsmaðurin Luis Eduardo, fekk seks prosent.

Í valstríðnum hevur Alvaro Uribe lovað kolombiska fólkinum, athann fer at fáa enda á borgarakrígnum millum stjórnarherin og ta vinstrasinnaðu FARC-rørsluna, sum í fleiri ár hevur stríðst ímóti almennu myndugleikunum. FARC royndi eisini at órógva valið. M. a. varð eitt valevni burturflutt og er ikki komið afturíaftur enn. Stjórnin hevði sent fleiri túsund hermenn at verja valstøðini, og altjóða eygleiðarar í Kolombia siga, at valið er eitt tað friðarligasta, sum hevur verið í Kolombia í mong ár.

Tá valúrslitið var greitt, boðaði Alvaro Uribe frá, at hann ætlar sær at fáa í lag samráðingar við FARC sum skjótast, men hann hevur eisini gjørt greitt, at vil tann vinstrasinnaða rørslan ikki samráðast um frið, er hann til reiðar at fremja neyðug tiltøk fyri at steðga virkseminum hjá FARC.

Amerikanska stjórnin boðaði sunnukvøldið frá, at hon viðurkennir úrslitið av kolombiska tjóðartingsvalinum. Í kunngerðini úr Washington varð sagt, at USA vónar, at tann nýggi forsetin kann tryggja kolombiska fólkinum frið í landinum.

# Flogfarið varð ikki skotið niður

**Herleiðslan í Taiwan vísir aftur gitingum um, at ein kinesisk rakett var orsøkin til, at eitt ferðamannaflogfar datt niður leygardagin**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*

Hernaðarligu myndugleikarnir í Taiwan vísa aftur øllum gitingum um, at ferðamannaflogfarið, sum datt niður í havið millum Taiwan og Hongkong leygardagin, varð rakt av einari kinesiskari rakett.

Ein talsmaður hjá taiwansku herleiðsluni avsannaði í gjár, at tað var ein kinesisk rakett, sum rakti flogfarið. Hann vísti samstundis á, at Kina hevur víst gitingunum um rakettina aftur.

Taiwansku myndugleikarnir vita ikki, hví flogfarið við teimum 225 fólkunum umborð datt niður. Hernaðarligar lurtistøðir í Taiwan skrásettu leygardagin tekin, sum benda á, at flogfarið fór í fýra, tá tað fleyg í 9000 metra hædd, men hvat hendi, veit eingin. Tann mest trúliga frágreiðingin er, at ein spreinging varí flogfarinum.

Í gjár leitaðu taiwanskir kavarar eftir tí svarta kassanum, sum kanska kann greiða frá, hvat hendi flogfarinum.

Úr Norðurlondum:

## Býráð fór frá

Býráðslimirnir í norðurnorsku kommununi Vardø gjørdu í síðstu viku av at leggja frá sær, tí teir vóru so misnøgdir við viðferðina, sum kommunan fekk frá landsmyndugleikunum.

M. a. ætlaðu myndugleikarnir í Oslo at steingja floghavnina í kommununi og at lata skrivstovuna hjá fiskiveiðieftirlitinum aftur. Hetta var meiri, at teir lokalu politikararnir vildu lata sær lynda, og tí gjørdu av teir at leggja býráðsstarvið niður - fyribils í hvussu var.

Og hetta loysti seg, tí nú eina viku seinni hevur kommunan í Vardø fingið at vita frá sjálvari stjórnini í Oslo, at floghavnin verður verandi opin, og at skrivstovan hjá fiskiveiðieftirlitinum verður heldur ikki latin aftur. Og samstundis hevur stjórnin lovað, at hon fer at virka fyri, at millum 30 og 50 nýggj arbeiðspláss koma í kommununi. Býráðslimirnir hava tí gjørt av at taka arbeiðið í býráðnum uppaftur.

## Dunkarnir seinkaðir

Danska stjórnin hevur gjørt av, at danir skulu sleppa at drekka øl úr dunkum. Ætlanin var, at dunkarnir skuldu koma á handilshillarnar í summar, men hetta verður ikki fyrr enn einaferð í heyst. Orsøkin er, at ES hevur ikki góðkent reglurnar um, hvussu fólk skulu lata teir tómu dunkarnar innaftur.

## Ólógligar tenn

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, noyddist í síðstu viku at lata tollvaldinum tvær fílatenn, sum hann hevði fingið sum gávu, tá hann herfyri var í Nigeria og vitjaði. Orsøkin er, at tað er bannað at innflyta fílatenn til Noregs. Kona forsætisráðharrans, Bjørg Bondevik, fekk á ferðini eina tasku úr slanguskinni, og hon fær fyrsta dagin boð um at lata tollvaldinum taskuna, tí tað er eisini bannað at innflyta lutir úr slanguskinni til Noregs.




## Goymslufólk

Hervið verður søkt eftir einum fólki m/k til goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt.
Fyrimunur er um umsøkjarin hevur goymslu- ella handilsútbúgving, men hetta er ikki nakað krav.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn.

Pf Svend Krosstein
Falkavegur - tlf. 31 46 00
VHS
All tilfar til
VATN
HITAVERK
SANITET

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini største VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Vit eru umleið 20 starvsfólk, sum samstarva væl í einum góðum arbeiðsanda, har trivnaðurin verður høgt mettur.

## Handilslærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, baðirúmsútbúnað og líknandi, hava vit eitt læruppláss leyst at søkja.

Tú kemur at arbeiða innan øll økir í søluliðnum í fyritøkuni, so sum goymsluarbeiði, avgreiðsla og vegleiðing av kundum, útrokning av tilboðum og innkeyp við meira. Arbeiðstíðin er frá kl. 8.00 – 17.00.
Skúlagongdin fer í løtuni fram í Danmark.

Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði. Eisini gevur henda útbúgving góðar møguleikar fyri víðari útbúgving á mongum økjum.

Hevur tú HH er lærutíðin uml. 2 ár og hevur tú FHS er lærutíðin uml. 3 ár.
Byrjunarlønin fyri FHS'ara er kr. 8.176,90 um mánaðan og fyri HH'ara kr. 8.994,59.

Ætlanin er, at tú skalt byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum, so um tú verður liðug/ur við skúlan í summar, ert tú vælkomin at søkja.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum.

Pf Svend Krosstein
Falkavegur - tlf. 31 46 00
VHS
All tilfar til
VATN
HITAVERK
SANITET

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini største VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Vit eru umleið 20 starvsfólk, sum samstarva væl í einum góðum arbeiðsanda, har trivnaðurin verður høgt mettur.

## Bilsmiður søkist

Søkt verður eftir bilsmiði til mekaniska verkstað okkara skjótast møguligt

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310·600

team 85 • 35800

## Deildarstjóri á nýggjari deild

Handilsskúlin er í støðugari menning. Stórar avbjóðingar eru fyri framman.

Til tess at møta hesum avbjóðingum hevur skúlin avgjørt at stovna eina menningardeild, sum hevur til **endamáls at:**

- skunda undir menningina á skúlanum
- samskipa átøk hvørs endamál eru áhaldandi at menna handilsskúlan, herímillum undirvísing á teimum ymsu stigunum..
- menna undirvísingarførleikan á skúlanum
- vaksa um útbúgvingartilboð fyrst og fremst á hægri stigi
- saman við stjóranum at stýra dygdarmenningini á skúlanum

Vit søkja eftir einum deildarstjóra, sum hevur áhuga í at arbeiða á einum skúla og hevur hug at arbeiða í leiðslutoymi.

**Høvuðsuppgávurnar verða í fyrstu atløgu at:**

- gera avtalur við hægri lærustovnar uttanlands og fylgja avtalunum upp í Føroyum
- samstarva við undirvísingar- og granskingarstovnar
- samstarva við møguligar stuðlar
- arbeiða við dygdarmenningini
- fjøltátta skeiðsvirksemið

**Tín persónmenska**
Um tú skalt trívast í arbeiðinum er týdningarmikið at vera opin, hava dirvi, hug at seta teg í nýggj viðurskifti, vera forvitin og broytingarhugað/-ur og varðveita hóvsemi, um nógv er at gera. Síðst men ikki minst, at tú hevur natúrligan myndugleika og ert eldhugað/-ur í sinni.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava:

- viðkomandi hægri útbúgving frá lærdum háskúla
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- vilja og evni at royna nakað nýtt
- áhuga fyri avbjóðingum
- evni at samstarva við onnur
- málsligan førleika at orða seg á føroyskum, donskum og enskum máli

Umsøkjarar við fyrisitingarligum royndum hava fyrimun.

**Vit bjóða:**

- eitt sjálvstøðugt starv í einum mennandi umhvørvi
- møguleikar fyri eftirútbúgving
- gott umhvørvi
- virknar starvsfelagar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Setanartreytirnar verða avtalaðar nærri við tann, sum settur verður. Lønt verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum skulu sendast til:
Føroya Handilsskúla, stýrið, Marknagilsvegur 77, Postmoga 177
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 7. juni 2002. Starvið verður sett frá 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, vinarliga ring Tel 317177 og tosa við Ragnar Magnussen stjóra á Føroya Handilsskúla.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel 317177, Fax 313374